# Fimm ferðir so nógvur upsi fer nú beinleiðis av landinum


*Sambært hagtølunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum eru sløk 5.000 tons av upsa landað beinleiðis uttanlands higartil í ár. Tað er heili fimm ferðir so nógv, sum alt árið í fjør*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Samlaðu nøgdirnar av ráfiski, sum beinleiðis eru landaðar uttanlands higartil í ár, eru longu nú tvífalt so stórar sum alt árið í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Vinnuhúsinum hava tey hugt at hagtølum, sum Fiskiveiðieftirlitið ger yvir beinleiðis landingar hjá føroyskum ísfiskaskipum uttanlands.

Samlaðu nøgdirnar í ár eru rættiliga nógv øktar.

Hagtølini vísa nevniliga, at tvífalt so nógvur fiskur er farin beinleiðis av landinum higartil í ár sum alt árið í fjør.

### Serliga upsi

Vøksturin í beinleiðis útflutningi av upsa er størstur, og her er talan um ikki minni enn eina fimmfaldingi í útflutningstølunum.

Sambært hagtølunum eru útflutningstølini higartil í ár hesi (Tølini í klumbrum eru samlaðu tølini fyri 2004. Í báðum førum eru tølini avrundað):

Toskur 1.282 tons (343), hýsa 807 tons (318) og upsi 4.953 (971).

Aftrat hesum kemur "annað". Talið higartil í ár er 3.167 tons (3.410).

### Eisini toskur

Tilsamans eru 10.209 tons av ráfiski flutt beinleiðis av landinum higartil í ár ímóti 5.043 tonsum alt árið í fjør.

Tølini vísa, at beinleiðis landingarnar av upsa uttanlands eru sum nevnt fimmfaldaðar, og somuleiðis eru nøgdirnar av toski nógv øktar; úr 343 tonsum í 2004 upp í 1.282 tons higartil í ár.

# Nornagestur og Kolumbus landa til Sandoy Seafood

**- Ein og hvør fiskakeypari noyðist hvørja ferð, ein søla er, at sannføra seljaran um, at tað loysir seg at koma við fiskinum, sigur Andreas F. Hansen, virkisleiðari á Sandoy Seafood og formaður í Føroya Ráfiskakeyparafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið skipini, Nornagestur og Kolumbus, sum vóru heimahoyrandi í Sandoynni, vórðu seld til Vestmannar fyrr í heyst, tók ivi seg upp um, hvørt virkini hjá Sandoy Seafood nú fóru at noyðast at vera fiskin hjá hesum báðum skipum fyri uttran.

Men tað hevur ikki víst seg og orðini hjá virkisleiðaranum á Sandoy Seafood, Andreasi F. Hansen eftir eigaraskiftið, hava veruliga staðið sína roynd.

Andreas helt fyri, at eingin fær nakað fyri einki, og hugsandi er tí ikki, at Nornagestur og Kolumbus hava landað á Sandi seinastu árini bara tí, at sandoyingar áttu skipini.

- Úrslitini vísa, at tað hevur loyst seg hjá skipunum at landa veiðina til Sandoy Seafood, segði hann.

### Gott samstarv

Síðan eigaraskiftið, hava Nornagestur og Kolumbus lagt veiðina upp í Sandoynni, og hetta fegnast stjórin saman við sandoyingum um.

- Jú, vit hava gott samstarv við nýggju eigararnar, eins og vit høvdu við teir gomlu. At fáa fatur á fiski í tíðum sum hesum, er altíð ein spurningur um prís, tí stór kapping er um rávøruna. Tað er ikki soleiðis, at skipini bara landa í Sandoynni – og so tosa vit um prísin aftaná. Soleiðis gongur tað ikki fyri seg, sigur hann.

### At sannføra

Andreas F. Hansen vísir á, at ein og hvør fiskakeypari noyðist hvørja ferð, ein søla er, at sannføra seljaran um, at tað loysir seg at koma við fiskinum.

Spurdur, um hann væntar, at skipini í framtíðini verða líka so dyggir stuðlar undir ráfiskatilgongdini hjá virkjunum í Sandoynni sum higartil, sigur hann:

- Soleingi, vit eru kappingarførir í prísi og tænastu, dugi eg ikki at síggja, hví góða samstarvið, vit hava við nýggju eigararar, ikki skal halda fram, sigur Andreas F. Hansen, virkisleiðari á Sandoy Seafood.



Føroyski ísfiskaflotin:

# Hevði spart olju og tíð, um russar sluppu at keypa


*Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Hóast russisku skipini ikki keypa upsa við føroyskan bryggjukant longur, síggja vit, at nógvur upsi fer at landinum kortini, sigur Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvat er skilagott – og hvat er ikki?

Hetta er ein góður spurningur.

Er tað skilagott, at føroysk ísfiskaskip skulu noyðast at sigla longu leiðina niður til Danmarkar við upsa, tá ið tey í staðin kundu landað fiskin til russisk skip við føroyskan bryggjukant?

Hagtølini vísa, at hóast eingi russisk skip nú keypa smáan upsa í Føroyum, eru beinleiðis upsalandingarnar í útlandinum nógv størri enn nakrantíð.

Tær eru nevniliga meira enn fimmfaldaðar í ár!

Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum, heldur tað vera undarligt, nú oljan er so dýr – og skip missa eini fimm samdøgur, tá ið tey sigla niður til Danmarkar, at myndugleikarnir í Føroyum ikki líka so væl kunnu loyva russiskum skipum at keypa fiskin í Føroyum.

- Eg skilji væl, at landsstýrismaðurin hugsar um arbeiðarafeløgini – og tað, at fiskurin verður virkaður í Føroyum, men tað, sum vit síggja, er, at hóast eingi russisk skip longur keypa upsa í Føroyum, fara stórar nøgdir av landinum kortini – ja, nógv størri enn nakrantíð áður.

Tá ið russisk skip byrjaðu at keypa upsa í Føroyum í vár, var upsaprísurin í botni.

Skip lógu á Vági, Runavík, Vestmanna og í Sørvági og samlaðu nøgdirnar, tey keyptu fyri líkinda prís – og munandi betri prís, enn føroysku fiskavirkini kundu bjóða, vóru eini 2000 tons.

Hesi 2000 tonsini eru ikki íroknaði tey út við 5000 tonsini av upsa, sum føroysk ísfiskaskip hava siglt beinleiðis á marknaðin við í ár.

Árni Dam spyr, hvar logikkurin er í hesum.

Hann heldur, at sum samfelag áttu vit at hugsað um, at skipini kunnu spara olju og tíð.

- Vit fáa hvørja viku fyrispurningar frá feløgum, sum vilja keypa upsa til Ruslands, men landsstýrismaðurin vil ikki loyva skipum at keypa um føroyskan bryggjukant.

Árni Dam sigur seg onga løtu ivast í, at russar, sum vilja keypa bílig fiskasløg frá føroyingum, høvdu viljað givið líka góðan prís fyri fiskin, sum føroysk ísfiskaskip fáa við beinleiðis landingum á útlendska marknaðinum.